# JÓNARHORNUM

## Evropasamveldið – ES

- ES er eitt politiskt og búskaparligt samstarv millum lond í Evropa.
- Síðani 2007 hava tað verið 27 limalond.
- ES er, við sínum 501 mió. íbúgvum og 12 billiónum í samlaðum BTÚ, tann størsta búskaparliga og politiska eindin í heiminum.
- ES byggir á felagskapin EF, men hevur nú fleiri limalond, samstundis sum samveldið kann meiri, enn EF kundi.
- Eitt av kjarnumálunum í ES-samstarvinum er ein innari marknaður við felags handilspolitikki, felags politikki fyri fiskiskap og landbúnað, umframt einum politikki, sum stuðlar teimum minni mentu umráðunum í ES.
- • ES hevur felags gjaldoyra, evruna, sum higartil er galdandi í 15 londum.
- Samveldið hevur ein avmarkaðan felags uttanríkis- og trygdarpolitikk, og eitt avmarkað rættarligt- og løgregluligt samstarv ímóti kriminaliteti tvørturum landamørk.



**EBS**

Evropeiskt Búskaparligt Samstarv – EBS

EBS er ein fríhandilsavtala ímillum øll limalondini í ES umframt trý av londunum í EFTA: Noreg, Ísland og Lichtenstein.
Við EBS avtaluni eru virðini, sum ES hevur um tann innara marknaðin, eisini galdandi fyri tey trý EFTA londini, sum hava skrivað undir.

**» Besta leiðin fyri føroyingar er limaskapur í ES umvegis Danmark.**

KAJ LEO JOHANNESEN

# eikin

**» Vit høvdu staðið sterkt, um øll londini í norðuratlantshavi stóðu saman mótvegis felagsskapum sum ES. Vit liva jú í einum av tilfeingisríkastu økjunum í heiminum.**

HØGNI HOYDAL

**Helgi Hjørvar, Ísland:**

# ES er einasti vegurin inn í framtíðina

**– Ísland hevur verið ígjøgnum tvey stór skrædl innan stutta tíð. Fyrst við gjaldoyranum og so nú við stóru kreppuni. Eg vænti ikki, at kreppurnar høvdu tikið so fast, um vit vóru limir í ES, tí so hevði verið betri stýring við búskapinum, segði Helgi Hjørvar, altingslimur í Íslandi og formaður í Norðurlandaráðnum.**

– ES kann samanberast við, at tað er ein stórur fílur í rúminum, sum eingin tosar um. Vit mugu hava ES á breddan, vit mugu tosa um hendan fílin. Framtíðin er í ES, og eg dugi ikki at síggja nakran annan møguleika fyri Ísland, segði Hjørvar.

Høvuðsargumentið hjá honum var rættiliga sosialistiskt litað; at tað er best at hava felags politiska stýring, tá man hevur so nógv onnur ting í felag.

Hann kom lítið inn á verandi støðuna í Íslandi, men hann treiv tó í tað.

– Tað, sum er hent í Íslandi er ræðuligt, men eg vænti ikki, at skrædlið hevði verið eins stórt, um vit vóru partur av ES. Tað hevði ikki latið seg gjørt, tí so hevði verið neyvari eftirlit. Og so høvdu vit ikki verið 300.000 fólk, ið stóðu einsamøll, men 300.000 fólk, sum vóru partur av eini størri eind.

– Men limaskapurin verður tó ikki veruleiki fyri ein og hvønn prís. Vit liva av fiskinum, og vit fara at forhandla um rættindini til fiskin. Vit skulu hava nøkur undantøk á tí økinum, fyri at fara uppí ES.

Júst hvar markið gongur og hvussu nógva stýring úr Brússel, Ísland fer at góðtaka á fiskivinnuøkinum, vildi Hjørvar tó ikki svara uppá. – Tað kann eg ikki siga, fyrr enn vit sita og samráðast. Men har er eitt pínumark, segði hann.

Norska Kirsti Bergstrø legði í eini viðmerking dent á, at Íslendingar ikki máttu vera so góðtrúnir at vænta, at ES fór at loyva teimum serligar avtalur. – Ísland hevur størri týdning fyri ES, enn ES hevur fyri Ísland, so ansið tykkum, ávaraði hon.

**» Tað er ein fílur í rúminum, sum eingin tosar um. Vit mugu hava ES á breddan.**

HELGI HJØRVAR UM ES



*Helgi Hjørvar, altingslimur í Íslandi og formaður í Norðurlandaráðnum.*